# Todi segði farvæl við sigri



Todi Jónsson segði sunnudagin farvæl við norskan fótbólt. Tað gjørdi hann á heimavøllinum í Kristiansand, har Start vann 2-1 á Odd Grenland. Gestirnir vóru á odda eftir 1. hálvleik. Todi Jónsson varð skiftur inn, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir. Í yvirtíðini var um reppið, at Todi skoraði fyrsta málið í hesum kappingarárinum, men bólturin fór ov langt frá honum.

Sigurin ber við sær, at Start endaði á sætta plássi. Tað er væl lakari enn silvurplássið í fjør, men tað er betri, enn soltnu úrslitini nøgvu tey fyrstu umførini bóru boð um. Vánaligu úrslitini bóru við sær, at venjarin varð sagdur úr starvinum, tá ið Start hevði verið á Svangaskarði og spælt ímóti Skála í UEFA Cup.

Stóra søgan sunnudagin var, at Viking Stavanger við 5-0 heimasigri á Brann úr Bergen slapp bæði undan beinleiðis niðurflyting og endaspæli um at halda fram í bestu deildini.

Tá ið Tom Nordlie – sekkjaði Start venjarin – tíðliga í heyst tók við venjarastarvinum í Stavanger, var tað mest sum óhugsandi, at tað skuldi eydnast at halda Viking í bestu deildini. Tí var einki at siga til, at Tom Nordlie skein sum sólin í kvøld.

Rosenborg er meistari. Niður úr bestu deildini flyta Ham-Kam og gamla felagið hjá Jákupi Mikkelsen, Molde, sum endaði á aftasta plássi. Odd Grenland skal spæla um rættin at halda fram í bestu deildini.

Neistin-H71 33-28 (14-16):

# Vaknaðu í tøkum tíma

**Tveir triðingar av dystinum vóru tað hoyvíkingar, sum høvdu betri og greiðari spæl. Men tá Neistin fekk spælið at koyra seinastu 20 minuttirnar, skrædnaði av álvara**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tá Neistin brádliga vaknaði, megnaðu hoyvíkingarnir ikki at gera tað heilt stóra*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Longu undan kappingarbyrjan vóru útmeldingarnar frá Neistanum greiðar. Manslíðið hjá felagnum, sum í fjør bara vann ein dyst, skuldi eftir FM-heitinum.

Og í so máta var eingin ivi um favoritt-leiklutin, tá Neistin tók móti H71 sunnudagin. Hoyvíkingar hava greitt staðfest, at teir nú skulu byggja upp av nýggjum, og tí var hetta ein dystur, sum Neistin skuldi vinna.

## Skilagóðir hoyvíkingar

Fyrstu longu løtuna tóktist sannleiksvirðið í Neistaútsagnunum tó ikki at vera tað heilt stóra. H71 hevði nevnliga takið á dystinum í longum løtum, og orsøkin var sum so rættiliga eyðsæð.

Í fyrsta lagi tóktust teir bláu at hava kannað sær bitan, áðrenn hann var svølgdur, og tað plagar at vera vandamikil kostur. Snøgt sagt, so vildu Neistamenninir ikki ofra nóg nógv fyri sigurin, og serliga í verjupartinum gav hetta at bíta. Somikið nógv, at var tað ikki fyri stórspæl frá Jacob Larsen í málinum, kundi leiðslan hjá H71 verið so nógv størri, enn hon var.

Og í øðrum lagi, so brúktu hoyvíkingarnir eisini innaru síðuna av høvdinum. Neistin hevur kanska betri einstaklingar í sínum hópi, men kollektivið hjá H71 sveiggjaði í takt. Og teir løgdu heldur ikki upp til meira, enn teir vistu seg megna. Kryddað við góðum detaljum frá serstakliga Tróndi Vatnhamar, tóktist H71 spakuliga draga frá, men teir megnaðu tó ikki at binda fyri, áðrenn bláa liðið vaknaði.

## Vaknaðu í tøkum tíma

Og tá Neistin so vaknaði, var tað við manér. Støðan hevði annars verið 16-20 eitt skifti, men tá H71 tók time-out, fekk Claus Rasmussen sett skil á sínar menn.

Fyrst og fremst, so kom verjan nú upp at koyra, og tað, sum hon ikki tók, tók ein sera væl upplagdur Ári Dam sær nú av.

Og so gekk tað annars skjótt fyri seg. Neistin tók seg við fullari ferð fram, og tá møðin samstundis tóktist gera um seg hjá gestunum, skrædnaði av álvara. Fleiri ferðir vórðu sjuskut mistøk revsað við bláum kontramálum, og sum minuttirnir gingu, bendi alt meira og meira á stórsigur.

## Rós til venjaran

Tryggur gjørdist sigurin undir øllum umstøðum í seinasta enda, og soleiðis staðfesti Neistin, at tað kann roknast við teimum í ár.

Men tað setir so sanniliga eisini krøv til spælarar. Ikki minst um, at teir hvønn tann einasta dyst skulu vera klárir at fara upp á maskimalar snúningar.

Hoyvíkingarnir fingu ikki nakað í sín lut hesaferð, tá talan er um stigaposan. Men unga liðið fekk enn ein posa av royndum við sær, og bara tær í sjálvum sær kunnu verða nógv verdar. Í so máta nýtist teimum bara at hyggja at Neistanum, har Claus Rasmussen eigur stórt rós uppiborið fyri tað uppbyggjandi arbeiðið, sum hann framdi í fjør. Hóast stórur partur av liðnum enn er tann sami, so eru einstaki spælararnir mentir nógv. Og við kryddinum, sum nýggju spælararnir hava givið, tykist liðið nú veruliga vera ført fyri at taka dystin upp við tey stóru.

## Stíla eftir toppinum

Tróndur Kragesteen var skjótur at ásanna, at spælið hjá Neistanum hevði verið lítið sannførandi stóran part av dystinum móti H71. Men hann helt ikki, at teir høvdu undirmett hoyvíkingar.

– Summar dystir er tað bara so, at tú ikki ert í snúningum. Og tað haldi eg var galdandi fyri okkum stóran part av dystinum.

*Men hvat er tað so, sum ger, at tit brádliga koma ígongd?*

– Vit fáa verjuna at koyra. Hon er altíð grundarlagið í hondbólti. Tað steðgar teimum í at skora, og tá vit so samstundis fáa nøkur løtt kontra-mál, gevur tað okkum luft. Og eftir tað var eingin ivi um úrslitið.

*Tit hava undan árinum í ár sagt, at gullið er málið. Er tann setningurin eins greiður framvegis?*

– Har er eingin broyting. Vit ætla okkum allan vegin, og tað er tað, sum vit allir sum ein arbeiða knallhart fyri, sigur Tróndur.

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-H71 33-28 (14-16)**
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Blagoje Buga 9(4), Áki Mørk 6, Tróndur Kragesteen 6, Dann Thorleifsson 5, Birgir Poulsen 3, Helgi Michelsen 2, Jugoslav Djumic 2
**H71:** Esbern Patursson 7(4), Niels Viggo Niclassen 6, Tróndur Vatnhamar 4, Dánjal Tórgarð 4, Poul Kjartan Dam 3, Gunnar Bláberg 2, Olaf Vesturgarð 2
**Brotskøst:** Neistin 6, H71 4
**Útvísingar:** Neistin 7, H71 2
**Diskvalifikatión:** H71 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

Neistin-VB (28-19 (10-9):

# Neistin hevði fleiri gear



*Hóast VB í Daivu hevur ein tann besta spælaran í landinum, so er hetta ikki nóg mikið til at halda fast í oddaliðunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VB fylgdi við eina løtu, men tá Neistin fekk skil á sítt spæl, fekk mótstøðan ikki gjørt tað heilt stóra**

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað var lítil ivi um, at vinnarin var tann rætti, tá Neistin og VB tóktust sunnudagin.

Tí hóast Neistin í hálvan tíma als ikki fann tað spælið fram, sum roknast kann av liðnum, so megnaði VB sjáldan at hótta heimaliðið. Serstakliga vóru mangalrnir í verjupartinum stórir hjá gestunum, og hóast trilvandi Neista-spæl, so var tað bert ein blanding av vánaligum skotum og góðum málmansspæli frá Astu (m.a. bjarjaði hon fýra brotskøstum), sum gjørdi, at munurin í steðginum ikki var størri.

Hinvegin kann VB kanska eisini iðra seg um, at tær ikki vóru kaldari enn tað sama. Tí tá Neistin misbrúkti somikið nógvar møguleikar, so gav tað VB ein fríbillett til veruliga at koma í dystin, men hesari tók Erla Eliasen sær tó av, soleiðis at VB ikki fekk fleiri mál, enn gott var.

Eftir steðgin fekk Neistin tó eitt sindur betri skil á spælið, og so var mest sum liðugt. VB hevur í Daivu Toumaite kanska besta spælaran í landinum, men hon vaðr hildin í sera stuttum tjóðuri av teimum bláu, og hóast níggju mál frá henni, so var hetta ikki nóg mikið at køva mótstøðuna.

Og spurningurin er, hvørt VB í ár megnar at halda seg at heiðursmerkjunum, ella um liðið noyðist at spæla seinnu helvt av kappingini millum tey veikaru liðini. Higar til hava tær ikki sannført um, at teir eiga sjálvskrivað pláss millum tey fýra fremstu, og tað eigur at vera fremsta málið hjá liðnum.

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-VB 28-19( (10-9)**
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 9, Ása á Neystabø 6, Heidi Maria Akselsen 4(2), Annika Thomsen 3, Katja Eigemann 3, Elin Staksund 2, Gannvá Brockie 1
**VB:** Daiva Toumaite 9, Jóna Thorsteinsson 4(1), Ivana Ljubicic 2, Miriam Michelsen 1, Gunnvá Olsen 1, Theresa Joensen 1, Ruth Lisberg 1
**Brotskøst:** Neistin 6, VB 3
**Útvísingar:** Neistin 1, VB 6
**Diskvalifikatión:** VB 1 (beinleiðis reytt)